# Vandi var fyri at alt skipið kolaðist upp

**- Hetta var ein torfør uppgáva, tí so nógvur hiti og roykur var. Tá ið ringast stóð til, var eldurin eisini við at festa í messuna, og eg sá fyri mær, at eldurin fór at gera enda á øllum skipinum, sigur brandumsjónarmaðurin hjá Skálafjarðar Sløkkiliði, Sunnleif Højgaard**

ELDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Klokkan knapt hálvum eitt mikunáttina fekk Skálafjarðar Sløkkilið fráboðan um nógvan royk umborð á djúpvatnstrolaranum, Suðringi, sum liggur við bryggju í Runavíkar havn.

- Vit mannaðu okkum og fóru beinanvegin oman á skipið, sum lá úti á pierinum. Tá ið vit komu oman, sóu vit, at har var nógvur roykur, samstundis sum dekkið longu tá var rættiliga heitt. Vit avgjørdu fyrst at køla dekkið av og royna at sleppa niður á fabrikkina, haðani roykurin kom, og nógvi hitin stavaði. Men hetta var lættari sagt enn gjørt, tí møguleikarnir at sleppa niður á dekkið eru so avmarkaðir.

Brandumsjónarmaðurin hjá Skálafjarðar Sløkkiliði, Sunnleif Højgaard, greiðir frá, at teir valdu ikki at brúka óavmarkaðar nøgdir av vatni í arbeiðinum, tí hetta kundi føra til, at skipið legði seg og í ringasta føri koppaði.

- Tí avgjørdu vit at køla av við vatni og royna at sløkkja við skúmi. Dekkið var so ógvuliga heitt, at sjálvt botnurin í skónum, sum eru sergjørdir til slíkt arbeiði og hava innbygdan stálbotn, smeltaði.



*Tað sæst ikki uttan á skipinum, at tað fer at taka rúma tíð, áðrenn leggjast kann út á hav aftur*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Hugsandi er, at skammlop er orsøkin til, at øll fabrikkin umborð á Suðringi er kolað upp*
*Mynd: Vilmund Jacoben*

## Eldur allastaðni

Sunnleif sigur, at tá ið teir umsíðir sluppu niður á fabrikkina gjøgnum eina lúku í dekkinum, vísti tað seg at vera eldur allastaðni – og tá serliga uppi undir dekkinum.

- Vit kendu ikki fabrikkina, og tí var torført hjá okkara monnum at finna sær vegir í nógva roykinum og hitanum.

Hann sigur, at nakrir av sløkkiliðsmonnunum noyddust at bróta sær veg inn á brúnna og niður undir fyri at byrgja uppfyri, at eldurin ikki eisini breiddi seg fram í skipið - til messuna og manningarrúmini.

- Eldur, roykur og hitin á fabrikkini var so nógvur, at tað tók okkum meira enn tveir tímar at fáa tamarhald á støðuni. Vit eru tilsamans 47 sløkkiliðsmenn í liðnum hjá Skálafjarðar Sløkkiliði, og vit vóru 20 mans, sum tóku lut í arbeiðnum hesa náttina. Henda uppgávan var so mikið stór og torfør, at vit eisini sendu boð eftir sløkkiliðsmonnunum hinumegin fjørðin.

Hann vísir á, at tað er rættiliga tungt arbeiði hjá roykkavarum undir tílíkum umstøðum; teir gerast heitir og troyttast skjótt.

## Sá svart út

Sunnleif sigur, at øll fabrikkin umborð á Suðringi meira ella minni er kolað upp, men tíbetur er ikki líkt til, at maskinrúmið hevur fingið nakran serligan skaða.

- Tá ið ringast stóð til, var eldurin eisini við at festa í messuna, og eg sá fyri mær, at eldurin fór at gera enda á øllum skipinum. Men vit fingu byrgt upp fyri, at eldskaðin í messuni gjørdist lítil, tá ið saman um kom.

Ta einu løtuna var so mikið av vatni í skipinum, at sløkkiliðsmenninir noyddist at pumpa vatn upp úr skipinum.

- Suðringur legði seg nakað, og eitt skifti stóð á endunum, soleiðis at vit máttu brúka pumpurnar hjá okkum til at pumpa sjógv upp úr skipinum við, sigur Sunnleif Højgaard, sum fegnast um, at tað í øllum góðum eydnaðist hansara monnum at basa eldinum umborð á Suðringi.



*- Eg kom úr Sandoynni í morgun og visti einki um tilburðin, sigur reiðarin, Marner Lisberg*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Vandamiklar fløskur í eldi og hita

**Tá ið eitt sløkkilið verður boðsent, tí eldur eitt nú er umborð á einum skipi, lúrir vandin við fløskum av ymiskum slagi, sum kunnu spreingjast í luftina, um illa vil til. Og soleiðis var eisini í hesum førinum, nú eldur var í fabrikkini umborð á Suðringi**

ELDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Sum tíðin gekk, fingu vit fráboðan um, at nakrar stórar ilt-ella brintfløskur stóðu í einum rúmi á troldekkinum, og soleiðis stóðu tvær freon-fløskur eisini í einum øðrum rúmi umborð.

Sunnleif Højgaard, brandumsjónarmaður hjá Skálafjarðar Sløkkiliði, sigur, at stóru ilt-og brintfløskurnar vóru rættiliga heitar og stóðu í einum rúmi, sum var rættiliga heitt, tá ið teir komu fram á tær.

- Hetta eru stórar fløskur, sum ikki eru lættar at handfara. Vit fingu kølt fløskurnar og rúmið, har tær stóðu og fingu tær síðan út.

Hann ásannar, at slíkt er ikki gamansleikur og kann vera rættiliga vandamikið arbeiði, tí hesar fløskur kunnu spreingjast í nógvum hita – og pettir frá teimum kunnu fara ígjøgnum stál, um illa vil til.

- Jú, vit vóru bangnir fyri hesum stóru fløskunum, leggur hann aftrat.

Sunnleif Højgaard sigur, at freon-fløskurnar umborð á Suðringi haraftur ímóti vóru eingin trupulleiki, tí tær vóru ikki so heitar, tá ið sløkkiliðsmenninir komu fram á tær.

- Ta einu løtuna var ein minni spreinging umborð, men vit eru ikki rættiliga greiðir yvir, hvat tað var, sum hendi, sigur brandumsjónarmaðurin.



*- Jú, vit vóru bangnir fyri hesum stóru fløskunum, sum kunnu spreingjast í nógvum hita – og pettini frá teimum kunnu fara ígjøgnum stál, sigur Sunnleif Højgaard, brandumsjónarmaður*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*